

## Chris Brown biðjur Rihannu orsaka

Í einum filmi á heimasíðuni hjá sær biðjur Chris Brown um orsaka fyri eitt álop á Rihannu, sum millum annað er kend fyri at syngja um eitt regnskjól. Til fyri kortum gingu Rihanna og Chris Brown saman, men beint fyri Grammy virðislønirnar í Los Angeles leyp 21 ára gamli Chris Brown á ungu songkvinnuna. Sambært løgregluni skumpaði Chris Brown Rihannu fleiri ferðir, áðrenn hann byrjaði at kvala hana. Nú hevur hann so biðið orsaka fyri gerðirnar og sigur, at tað er ófyrigeviligt, sum hann hevur gjørt. Síðan hendingarnar sangarin fingið nógvan kritikk frá øðrum tónleikarum, umframt, at hann kann vænta sær ein fimm ára treytaðan dóm og einar seks mánaðir av samfelagstænastu. Hetta skrivar BBC.

Landsstýrismálanevndin:

# Vit gjørdu rætt

**Í gjár legði Hans Trygvi Teirin, advokatur, hart eftir landsstýrismálanevndini, tí hon bara hevði tikið Hans Paula Strøm úr rúgvuni. Jaspur Vang, formaður í nevndini, sigur, at tey gjørdu rætt. Hann fegnast somuleiðis, at tað ikki var ein kanningarstjóri á støðinum hjá Hans Trygva Teirin, sum hevur viðgjørt málið**

MEIRNÝTSLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Tað sær út sum, at rottan er roykt út úr holinum, og við niðurslitnum eygum er komin við einum dómi yvir ein í rúgvuni, segði Hans Trygvi Teirin í Sosialinum í gjár.

Jaspur Vang, formaður í landsstýrismálanevndini, heldur serstakliga lítið um orðingarnar hjá Hans Trygva Teirin í gjár.

- Hatta er eitt ótrúliga lágt støði. Men eg skal svara tí, fjølmiðlarnir hava at spyrja um, sigur Jaspur Vang.

### Ein í rúgvuni

Eitt av kritikkpunktunum hjá Hans Trygva Teirin var, at landsstýrismálanevndin bara hevur tikið ein úr rúgvuni. Og hetta skilir Jaspur Vang partvís, men vísir á, at landsstýrismálanevndin hevur sitið í minni enn eitt ár, og hevur havt nógv at gera

- Nú er tað soleiðis, at í konkreta førinum var talan um eina ávísan landsstýrismann og eina ávísa klagu. Tað var hana vit viðgjørdu. Men tað er eisini soleiðis, at nevndin kann taka ting upp av sínum eintingum, men tað hava vit ikki gjørt, og tað hevur ikki verið vanligt, sigur Jaspur Vang.

### Ongan kanningarstjóra

Til spurningin hví nevndin ikki nýtti kanningarstjóra, sum annars hevur verið vanligt, er Jaspur Vang sannførdur um, at nevndin gjørdi tað rætta.

- Tað var ein rímiliga greið niðurstøða at koma til, tí bæði landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðanin komu til somu niðurstøðu, sigur hann.

Somuleiðis greiðir hann frá, at tað persónliga var óheppið, at hetta rakti Hans Paula Strøm, men meirnýtsla er staðfest, so niðurstøðan var løtt at koma til.

- Eg eri somuleiðis fegin um, at tað ikki er ein kanningarstjóri, sum er á støðinum hjá Hans Trygva Teirin, sum hevur viðgjørt hetta málið, sigur Jaspur Vang.

### Ímóti tinginum

Eisini vísti Hans Trygvi Teirin á, at landsstýrismálanevndin illa kann fara aftur um roknskapir hjá tinginum, sum eru góðkendir, tí nevndin er vald av tinginum og er tí undir tinginum. Roknskapirnir hjá Hans Paula Strøm fyri 2005 og 2006 eru í hvussu so er góðkendir av tinginum.

Formaðurin í nevndini vísir hesum aftur.

- Vit eru í fleiri førum farin langt aftur í tíðina, og tí dugi eg illa at ímynda mær, at tað skal vera nakar trupulleiki, sigur Jaspur Vang.

Hann leggur afturat, at tað er púra skeivt at siga, at landsstýrismálanevndin er komin við einum dómi, tí hon er bara komin við eini endaligari niðurstøðu.

### Komið við fleiri

Um so var, at kærur komu um landsstýrisfólk, sum sótu fyri 10 árum síðan, so metir Jaspur Vang, at tað hevði verið nakað, nevndin tók upp á sama hátt.

- Koma kærur, so skulu vit sjálvandi viðgera tær. Um tað so er um mál fyri einum 10 árum síðan. Eg dugi eisini væl at ímynda mær, at fleiri kærur koma, sigur hann.

Jaspur Vang sigur eisini, at tað ikki er útilokað, at landsstýrismálanevndin av sínum eintingum tekur mál um meirnýtslu upp í framtíðini.

### Øll kunnu kæra

Tað er eisini soleiðis, at skuldi landsstýrismálanevndin ikki tikið nakra aðra meirnýtslu upp, so hava øll møguleika at kæra til nevndina.

Í løtuni eru Helena Dam á Neystabø, mentamálaráðharri, Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, og Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, í landsstýrinum av fólkum, sum sambært yvirlitinum hjá fíggjarmálaráðnum hava havt ein leiklut í meirnýtslu seinastu 10 árini.


Sosialurin
Nr. 136 • Mánadagur • 20. juli 2009 • 83. árg. • Kr. 20,00
Tvøroyri krevur 14 milliónir frá Smyrli
Síða 36
ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
8 síður við ítrótti
VIÐ MÚRIN
DÓMUR UTTAN GRUNDARLAG
Landsstýrimálanevndin bar seg ivasamt at, tá niðurstøða varð gjørd um meirnýtsluna hjá Hans Paula Strøm. Hans Trygvi Teirin, advokatur, sigur, at kanningarstjóri átti at verið settur. At landsstýrismálanevndin ikki kann fara aftur um roknskapir, sum eru góðkendir av løgtinginum. Og at tað var skeivt av nevndini, tá hon einvíst fór eftir meirnýtsluni hjá einum landsstýrismanni
Síða 4

*Í gjár segði Hans Trygvi Teirin, at Hans Pauli Strøm var tikin burturúr eini stórari rúgvu, og tí skilti hann ikki, at júst Hans Pauli Strøm skuldi fara frá. Jaspur Vang, formaður í landsstýrismálanevndini sigur, at tey viðgjørdu eina konkreta kæru, og tað er so púra greitt, at Hans Pauli Strøm breyt fleiri lógir*



*Eftir øllum at døma kemur fúrsti Albert II av Monako til Føroya í dag. Hann stendur nummar tvey frá vinstru. Eftir øllum at døma er tað fyri at vitja Ann Andreasen, longst til høgru, og barnaheimi í Ummannaq, at hann kemur til Føroya*
*Savnsmynd*

# Fúrstin av Monako til Føroya

**Eftir øllum at døma kemur fúrstin av Monako, Albert II, til Føroya í kvøld. Tað skilst, at tað er í samband við at barnaheimi í Ummannaq, sum Ann Andresen leiðir, er í Føroyum í løtuni**

VITJAN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Grønlendskir miðlar hava fyrr skrivað um, at fúrstin av Monako hevur verið og vitja barnaheimið í Ummannaq, sum Ann Andreasen hevur staðið á odda fyri í eini 24 ár.

Nú kemur fúrstin av Monako til Føroya at vitja, og tað er skjótt at gita sær til, at orsøkin til tess, er at barnaheimið í Ummannaq er í Føroyum og vitjar.

Í Grønlandi hevur tað verið soleiðis, at fúrstin hevur gjørt nógv fyri at vera privatur á vitjanini, og bert hevur úttalað seg til miðlar við endanum av vitjanunum.

Í gjár stóð grein í netmiðlinum hjá Sermitsiaq í Grønlandi, at fúrstin skuldi koma til Føroya, men stutt eftir var greinin tikin av aftur netinum.

Fúrsti Albert II av Monako er leiðari í lítla fýrstaveldinum í Fraklandi.

Hann er sonur sjónleikarinnuna Grace Kelly og Fúrsta Ranier III av Monako.

Fúrstin er gamal drongur, hóast hann fyrr hevur verið settur í samband við eina rúgvu av fotomodellum.